


*Millum útlendsku gestirnar hjá bogaskjúttunum um vikuskiftið, var norðmaðurin, Morten Bøe, ið er fyrrverandi heimsmeistari. Her sæst hann høgrumegin á myndini saman við Nikkel Petersen úr Ørvi*

# Magnus basti heimsmeistara

**BOGASKJÓTING** Tvær kappingar í bogaskjóting vóru um vikuskiftið, og í seinnu kappingini eydnaðist Magnusi Andreasen at vinna á norðmanninum, Magnus Bøe, ið hevur verið heimsmeistari

Hilmar Jan Hansen

Serligur áhugi var kanska fyri teimum báðum kappingunum í bogaskjóting um vikuskiftið, tí gestir vóru úr bæði Norra og Íslandi. Og serliga áhugavert mundi tað vera, at ein av gestunum var norski altjóða compound-skjúttin, Morten Bøe, sum áður hevur verið heimsmeistari við norska landsliðnum.

At dugur er í honum, vísti hann í innleiðandi skjótingini í kappingini Tambar Open leygardagin í Havn, tá hann fekk 595 stig av 600 møguligum. Hetta var samstundis hansara besta úrslit í innandura skjóting hetta árið.

Longu fríggjadagin vandi Morten Bøe við føroysku skjúttunum, umframt at hann hevði ein fyrilestur um mentala venjing, har hann eitt nú greitti frá sínum egnu royndum í altjóða skjóting.

Tambar Open-kappingin var skipað í bólkarnar compound og recurve, har menn og kvinnur skutu í hvør sínum bólki. Átta menn og tríggjar kvinnur vóru við í recurve, og átta menn og tvær kvinnur í compound.

Í recurve hjá kvinnum vann Annika Vang á Jastrid M. Jensen og hjá monnunum vann Absalon Hansen á Eggaba Andreasen. Í compound hjá kvinnum vann Rakul Dam, og hjá monnum stóð finalan millum Morten Bøe og ein av íslendsku skjúttunum, Kristmann Einarsson. Her vann Bøe 120-117 – 120 stig er tað mesta, ið kann fáast í einum finaludysti!

### Magnus tók Bøe

Sunnudagin skipaði VágaSkot fyri kappingin í høllini á Giljanesi, har skotið varð F2F, ið er »face to face«, har skjúttarnir í tveimum bólkum skutu 12 pílar ímóti hvørjum øðrum. Nummar eitt og tvey í hvørjum bólki fóru so til gull- og bronsufinalurnar, og teir næstu skjúttarnir skutu B-finalu.

Hjá teimum vaksnu, sum skutu á 18 metrum, vann Eggaba Andreasen finaluna í Recurve ímóti Oddmar Nielsen.

Í compound eydnaðist Magnusi Andreassen úr Ørvi at fara allan vegin og vinna. Tað, sum gjørdi tað ikki minni stuttligt hjá honum, var at hann í hálvfinaluni basti norðmanninum, Morten Bøe, fyri síðani at taka íslendingin, Kristmann Einarsson, í sjálvari finaluni. Eitt megnar úrslit!

Í hesi kappingini vóru børn eisini við, og tey skutu á 15 metrum, tó ikki sum F2F, men sum vanlig kapping við 60 pílum innleiðandi og síðani finalum. Í compund vann Sascha Due Niclasen úr VágaSkoti, og í recurve var Hans Johannessen úr Ørvi bestur við 529 stigum. Her kann leggjast aftrat, at í recurve vóru níggju skjúttar og sjey persónlig met!

# Fótbóltskvinnurnar á Malta

**FÓTBÓLTUR** Í morgin spælir kvinnulandsliðið í fótbólti fyrsta dystin í undankappingini á Malta. Kvinnurnar hava vant dúgliga og eru væl fyrireikaðar til dystirnar, hóast kunnleikin til mótstøðuna er avmarkaður

Hilmar Jan Hansen

Ferðin hjá fótbóltskvinnunum byrjaði í gjáramorgunin og vóru tær á Malta seint í gjárkvøldið. Har eru tær við í eini undankapping, har fýra lið eru í einum bólki og besta liðið teirra millum kemur víðari til sjálva EM-undankappingina.

Føroysku kvinnurnar eru í bólki saman við Armenia, Malta og Georgia, og fyrsti dysturin verður í morgin ímóti Armenia. Leygardagin spæla Føroyar ímóti Malta og týsdagin verður síðsti dysturin ímóti Georgia.

Landsliðið hevur vant miðvíst síðani hálvan november, og hava kvinnurnar hava verið samlaðar til venjing tríggjar ferðir um vikuna, umframt at fleiri venjingardystir eru spældir ímóti eitt nú dreingjaliðum.

### Góðar møguleikar

Álvur Hansen, landsliðsvenjari, heldur kvinnulandsliðið hava góðar møguleikar í hesi kappingini: – Eg dugi ikki heilt at siga, hvørja styrki mótstøðuliðini hava, men um ein hyggur at úrslitunum hjá teimum, skuldu vit havt góðar møguleikar at klárað okkum væl í kappingini, sigur hann.




*Heidi Sevdal og hinar á kvinnulandsliðnum spæla ímóti Armenia, Malta og Georgia*

Teir 17 spælararnir, sum eru farnir til Malta, eru Rannvá B. Andreasen, KÍ, Mona Breckmann, AB, Fríðrún Danielsen, Skála, Olga Kristina Hansen, AB, Sigrid Jacobsen, KÍ, Rakul M. Johannesen, B36, Sólvá Joensen, BK Skjold, Bjarta Ó. Johansen, HB, Malene Josephsen, KÍ, Margit Magnusdóttir, MB, Rakul V. Magnussen, Vejle BK, Paula Mikkelsen, KÍ, Ragna Patawary, KÍ, Ansy Sevdal, Víkingur, Heidi Sevdal, Víkingur, Randi S. Wardum, KÍ, og Anja Weyhe, B36.

Umframt Álv Hansen, landsliðsvenjara, eru eisini Jacob Thomsen, hjálparvenjari, Andras Gango, málmansvenjari, Sonja Skúvadal, fysioterapeutur, og Sonja á Líðarenda, liðleiðari, við á ferðini.

# Einki hoyrt um hylin

**SVIMJING** – Eg kenni ikki annað til ov stutta svimjihylin á Isle of Wight, enn tað, sum alment hevur verið frammi, sigur ÍSF-forsetin, Petur Elias Petersen, sum á stjórnarfundi í annaðkvøld fer at kunna seg nærri

Hilmar Jan Hansen

Hetta við ov stuttum svimjihylum á Oyggjaleikum er ikki nakað nýtt. Á Rhodos í 2007 var svimjihylurin nógvar sentimetrar ov stuttur, men tá var ikki ætlanin, at slíkt skuldi endurtaka seg. Tí kom føroysku svimjarunum dátt við, at kappingarhylurin á Isle of Wight er ov stuttur – hóast talan bara er um millimetrar.

At hylurin tí ikki lýkur altjóða FINA-krøv, kemur illa við hjá bæði Svimjisambandinum og føroysku svimjarunum, tí svimjararnir ganga ikki bara høgt uppí at vinna heiðursmerki, men satsa eisini nógv upp á sjálvar tíðirnar, sum á Oyggjaleikunum ofta eru bæði persónlig og føroysk met og kunnu brúkast sum tilmeldingartíðir til eitt nú EM- og HM-kappingar.

– At talan aftur hesa ferð er um ein ov stuttan kappingarhyl, hava vit hvørki fingið nakað at vitað um frá Svimjisambandinum ella oyggjaleikafelagsskapinum, IGA, sigur forsetin í ÍSF, Petur Elias Petersen, sum viðgongur, at hann gjørdist skakkur, tá hann frætti um ov stutta hylin á Isle of Wight.

– Har er neyvan nógv at gera, tí bara ein hylur er á Isle of Wight, ið kann brúkast til slíkar kappingar, men allíkavæl kann tað tykjast løgið, at IGA hevur góðkent hetta. Vit í ÍSF hava stjórnarfund í annaðkvøld, og tá ætli eg mær at fáa meira at vita um málið frá Svimjisambandinum.

*hilmarjan@sosialurin.fo*